# Løgmaður vanvirðir mannarættindini

HERGEIR NIELSEN



Eins ógvuslig niðurstøðan er, eins ógvuslig er framferð løgmans í málinum um føroyska medábyrgd í píning av rættarleysum medmenniskjum.

Løgmaður er komin eftir og viðgongur nú alment, at amerikanska flúgvingin yvir Føroyum ma. verður misnýtt til ólógligan fangaflutning.

Tá so er, vildu vit hildið, at løgmaður langaði til beinanvegin, og royndi at støðga hesum ólógliga flutningi.

Men so er ikki.

Løgmaður tekur sær góða tíð, og sigur enntá, at hann fer at bíða líka til Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, einfer aftur lendur í Føroyum.

Tástani, tá hesin hevur dosera løgmanni okkara nakrar árligar yvirskriftir úr uttanríkispolitiska meldrinum, fer Føroya Løgmaður at gera greitt, at loyvið hjá amerikanska herinum at flúgva yvir Føroyum ikki má misnýtast til ólógligan fangaflutning.

Árliga hendingin, har vit undrast og øtast yvir atgerðarloysið í føroyskum uttanríkispolitikki, er aftur á okkum.

Løgmaður fekk hesi somu tíðindi fyri einum ári síðan, og so eisini í øðrum umførum frammanundan hesum, og kortini rekur hann sama vanvirðisliga politikk mótvegis hesum fólkum.

Hann fer enn eina ferð at ganga við til at leingja loyvið hjá amerikanska herinum at flúgva í føroyskum loftrúmi.

Hóast teknar løgmans royna at dylja tað, so skal enn eina ferð sláast fast, at Tjóðveldisflokkurin í uttanlandsnevndini enn eina ferð hevur mælt til at noktað hesum flutningi av píndum menniskjum.

Øll minnast uppgjørdastásið hjá løgmanni um ávirkan og avgerðarrætt í føroyskum uttanríkispolitikki.

Hvar er nú hansara ávirkan og hvar eru hansara avgerðir, spyrja vit.

Hann kundi um ikki annað, nú hann er spurdur, faksað Ríkisumboðsmanninum eitt føroyskt mótmæli móti áhaldandi flutningi og píning av rættarleysum medmenniskjum í føroyskum loftrúmi.

Men tað vil Føroya Løgmaður so ikki gera.

Á fundi í uttanlandsnevndini mælti eg sum tann einasti frá at geva loyvi at flúgva í føroyskum loftrúmi og at lenda í Føroyum við skaðiligum farmi, sum eisini varð biðið um.

Hvør flúgving, fram var farin í farna ári, varð ikki upplýst. Um nøkur flúgving var farin fram higartil í ár, varð heldur ikki upplýst, og hvussu vandamikil ella skaðiligur farmurin var, varð heldur ikki upplýst.

Vit fingu onga hóming av, um ætlaða flúgvingin var í samsvari við føroysk áhugamál ella ikki, og heldur onga hóming fingu vit av, hvør tilbúgving kravdist, um veruligur vandi stóðst av tí vandamikla farminum.

Nógva stásið, ið gjørt varð burtur úr Fámjinsskjalinum frá 29. mars 2005, ið skuldi tryggja Føroyum ektað innlit og veruliga ávirkan á uttanríkis- og trygdarpolitisk viðurskifti, sást enn eina ferð ikki vert tað pappír, tað varð skrivað á.

Danmark hevur av sínum eintingum givið Íslandi ábyrgdina og umsitingina av lofthavinum yvir Føroyum, og løgmaður ánar ikki, hvussu stór ferðslan í føroyskum loftrúmi er.

Tað kennist tí heldur kollut, at uttanlandsnevndin skal ráðgeva løgmanni, hvør kann flúgva í einum lofthavi, sum danir hava avreitt íslendingum at umsita og bera ábyrgdina av.

Loftvegis flutningur og píning av fangum og mannarættindi teirra eru ógvuliga viðkvom og nógv umrødd evni aðrastaðni í heiminum, har altjóðaágerðin hevur flutt okkum munandi nærri hvør at øðrum.

Altjóða felagsskapir, harímillum Amnesty International, ST nevndin móti pining og ST serfrøðingar hava mælt til, at Guantánamo-legan verður latin aftur.

Kortini er fangalegan víðka, so hon nú rúmar 200 fangum afturat.

Nýggj lóggáva, sum beinleiðis er í stríð við altjóða mannarættindi, hevur millum annað við sær, at fangar kunnu sita lívstíð í amerikonskum varðhaldi uttan ákæru og uttan rætt til verju, har próvtilfar, sum er komið fram undir píning, verður nýtt móti teimum píndu.

Seinastu váttaðu tíðindini um árskifti frá FBI um píning av fangum í Guantanamo leguni, eru tengd at loftvegis flutningi av hesum fangum, og tá bendir nógv á, at vit standa hesum brotsverkum nærri enn gott er.

Upplýst er, at hesi brotsverk eru átøk framferðini hjá nazistunum undir seinna heimsbarda, og føroyingar spæla við.

*"Vísandi til hesi brot á mannarættindini varð mælt løgmanni til at krevja av donsku stjórnini, at hon virðir mannarættindini og undir ongum umstøðum loyvir flutningi av hesum fangum í føroyskum lofthavi."*

Hugstoytt var, at eingin annar tók undir við hesum tilmæli.

Tíverri hómast eingi frambrot fyri føroyskum uttanríkis- og trygdarpolitiskum áhugamálum.

Uttanríkispolitiska heimildarlógin gevur ongar heimildir, og Fámjinsskjalið sæst ongan týdning hava fingið yvirhøvur.

Hóast løgtingið í síni tíð samtykti, at øll tiltøk mótvegis Irak skuldu góðkennast av ST, so lupu danir saman við øðrum á, og eru teir nú endaðir í einum borgarakríggið, sum løgtingið upprunaliga tók greiða frástøðu frá.

*"Flúgving í føroyskum lofthavi við hernaðarflogførum er møguliga tengd at hesum kríggið, og mælt varð enn eina ferð løgmanni til at krevja av dønum, at Føroyar gerast leysar av tí skammiliga og óvirðiliga krígsgallskapi, sum danska ríkið er partur av, og at føroyskt lofthav undir ongum umstøðum verður brúkt til hetta endamál."*

Hugstoytt var, at eingin annar tók undir við hesum tilmæli heldur.

Men løgmaður, sum nú alment viðgongur, at talan veruliga er um mannarættindabrot, lenar seg uppafturá, og sigur seg bíða eftir, at ein av ráðharrunum, sum leyp á Irak, einaferð aftur kemur hendanvegin.

Tástani fer hann at gera vart við seg.

Neyðars líðandi menniskju, sum við løgmansins vilja og vitan verða flutt umvegis føroyskt sjó- og landaøki, verjuleys og rættarleys, til píningar, avhoyringar, ákærur og dóm.

# 266b: Eftirleikur

DÁVID ISFELD
lesandi



Mín spurningur til nógvar politikarar er: Hví gerast tit – av fríum vilja – ein virkandi partur av eini politiskari skipan, har samfelagsligi politikkurin er atskiltur átrúnaðinum, tá tit ikki góðtaka hesa skipan? Tað er jú ikki sum um, at tit ikki vistu av hesi atskiljing. Tá vit nú sum "avvarandi" at hesum politikarum, ið eru falnir mest sum fyri egi svør á tingsins vívølli, hvat skulu vit hugsa um hesar gerðir hjá okkara (háttvirdu?) umboðum á tingi? Hava hesir politikarar gloymt hvørja ábyrgd teir hava yvir fyri sínum flokki og sínum veljarum sambært verandi skipan?

**Dagsins yrki**

Um eitt uppskot verður lagt fram á tíng, ið viðkomandi tinglimur metur at vera eitt ringt uppskot av eini ella aðrari orsøk, so skal hann bara atkvøða ímóti, ella atkvøða blankt, um hann metur tað vera best ikki at atkvøða ímóti sínum floksfelagum. Tað er tann uppgáva hann hevur átikið sær av fríum vilja sum tinglimur, og tað er hansara skylda og ábyrgd, sum fólksins tænari og umboð á tingi, at atkvøða og siga sína hugsan frá tingsins røðarapalli – og onki annað. Tað vil fyrr ella seinni koma eitt mál fram á ting, sum fer at skapa øsing – soleiðis er tað nú einaferð – men tað merkir ikki, at so stendur tinglimum frítt at fara úr flokkum, skifta frá samgongu til andstøðu o.t. (hetta er eitt fólkaræði - ikki anarki). Tinglimirnir eru ein partur av einum fólkaræði og SKULU handla samsvarandi, ella fara úr politikki - og ikki úr einum flokki ella samgongu. Eftir tí, ein lesur og hoyrur, er tað neyðugt at sláa fast við sjey tumma seymi, at vit hava eitt fólkaræði, ið er atskilt átrúnaði, sum merkir, at politiskar reglur eru galdandi, og ikki bíbilskar reglur. Hetta merkir ikki at kristindómurin er deyður í føroyskum politikki, men at hesin átrúnaður, í politiskum samanhangi, bert er persónlig etisk vegleiðing og ikki dikterandi og omnipotentur løggevari. Hví er hetta so trupult at skilja fyri nøkur?

**Neyðugt skyn í einum fólkaræði**

Vegna trúðarfrælsi, talufrælsi og onnur rættindi í okkara fólkaræði ber tað einfalt ikki til at sameina samfelagsskipanina og bíbilskar reglur, tí hetta hevði havt við sær, at tað vildi verið sera nógv, ið ein ikki hevði muga sagt ella trúð uppá. Hetta er ikki torskilt. Tað kann óivað vera trupult, fyri flest fólk, altíð at góðtaka tað, sum henda tolsema skipan hevur við sær, men tað er henda skipan, vit eru sannførd um, er tann frægasta av øllum higartil royndum skipanum. Prestastýri, einaræði og anarki eru ongi góð alternativ – tað síggja vit hvønn dag úti í heimi, um vit leggja í at ásanna veruleikan av tí, vit síggja.

Lat tað at enda - og enn einaferð - verða sagt: tað ber ikki til at hava eitt fólkaræði við trúarfrælsi o.s.fr., og samstundis lóggeva við Bíbliuni í hendi sum alvitandi og alvaldandi reglubók. Um henda mótsøgn ikki kann skiljast av nøkrum tinglimum, eru teir einfalt ikki vituggir ella vísir nokk til hetta týdningarmikla og álvarsama starv.

**266b: Myta og veruleiki**

Nú 266b er viðtikið, er tíð til at koma víðari. Og lat okkum minnast til, at tað einasta 266b hevur samtykt er, at tað nú er ólógligt at gera mismun ímóti samkyndum, sum t.d. at rópa hágandi og haturfull orð eftir samkyndum, og velja ikki at seta samkynd í starv vegna teirra kynsligu orientering. Hetta er ikki í stríð við bíbilskan tekst, tí tað stendur ongastaðni í Bíbliuni, at vit ikki mugu verja tey samkyndu móti ágangi, vanvirðing og órætti. Løgtingið hevur ikki sagt, at tað er rætt (frítt fyri synd) at vera samkyndur. Tað er heldur ikki upp til Løgtingið, tí tað er ein átrúnaðarligur spurningur, ið er upp til hvønn einstakan. Tað er heldur ikki upp til Løgtingið at fordøma ótrúskap, sum florerar hóast Bíblian fordømir hesum atburði líka so nógv sum samkyndan livihátt; tað er eisini upp til hvønn einstakan. Løgtingið hevur bert viðtikið eina lóg, ið gevur teimum samkyndu frið og verju ímóti mismuni – er tað ringt? Er tað synd? Álvaratos, nú eigur hetta at vera greitt.

Illur???




Sig tína meining í Sosialinum